

## Marknaðardagur í Sjónleikarhúsinum

Árligi marknaðardagurin í Sjónleikarhúsinum verður 19. apríl klokkan 10. Havnar Sjónleikarfelag fer sum vant at hava básar við alskyns lutum: Krystalskálir, kongaligar figurar, leikur, klæðir, steintoy, jóla- og páskapynt, ymisk til handarbeiði, bøkur, møblar og annars alt, sum hjartað kann ynskja sær. Møguliga verður eisini uppboðsøla. Umframt hetta verður køkutombola og fiskibrunnur til tey smáu. Peningurin, sum gjøgnum árini er komin inn frá marknaðardegnum, hevur verið ein stór hjálp hjá felagnum. Hesin peningur er eyðmerktur til ábøtur í Sjónleikarhúsinum. Vit eru sera fegin um, at fólk – bæði í Havn og aðrastaðni – taka so væl undir við marknaðardegnum. Fólk eru fús at stuðla – bæði á degnum, men eisini við at lata lutir. Til ber at lata Sjónleikarhúsinum lutir frá mánadegnum 14.– 17. apríl kl. 8 til 20, skrivar Havnar Sjónleikarfelag í tíðindaskrivi.

*Lagt til rættis: Rólant Waag Dam*
*Myndir: Símun J. Hansen*

# Farvæl blokkstuðul

**150 fólk høvdu leitað sær á Christiansborg seinnapartin fríggjadagin, har Norðuratlantsbólkurin hevði skipað fyri Studentadegi saman við studentafelagsskapunum hjá grønlendsku og føroysku lesandi. Evnið fyri dagin var »Farvæl til blokkstuðulin – og hvat so?«, og orðstýrari var Páll Holm Johannesen. Dyrnar lótu upp klokkan 12, men sjálvt tiltakið byrjaði ikki fyrr enn klokkan 13, og endaði tað klokkan 17.30. Rás2 sendi beinleiðis frá tiltakinum, umframt at tiltakið eisini varð dekkað á Portalinum. Her fæst eitt yvirlit yvir tað, politikararnir søgdu:**





### Julianne Henningsen, Norðuratlantsbólkurin

Julianne Henningsen setti Studentadagin á Christiansborg, sum Norðuratlandsbólkurin og studentafelagsskapirnir hjá grønlendskum og føroyskum lesandi skipaðu fyri fríggjadagin í farnu viku. Hon gleddist um at kunna brúka dagin saman við teimum 150 áhoyrarunum og politikarunum.

Julianne Henningsen gjørdi greitt, at blokkurin fyllir nógv í tosinum um ríkisfelagsskapin. Men hon segði tað vera hennara ynski, at londini eisini fóru at kunna tosa saman eftir, at blokkstuðulin var burtur. Men inntil ta tíð mugu londini eisini kunna tosa saman um okkara felagsvirði, segði hon, og nevndi felags politisku søgu okkara, handilin millum londini, málini og mentanina. Hesa virði hvørva ikki, hóast blokkurin hvørvur og londini verða leys av hvør øðrum, førdi Julianne Henningsen fram.



### Naser Khader, Ny Alliance

Formaðurin í Ny Alliance, Naser Khader, valdi persónliga vinkulin, heldur enn at tosa yvirskipað um ríkisfelagsskapin. Og persónligi vinkulin vóru hendingar, sum ikki fullu í góða jørð í Grønlandi og Føroyum. Her nevndi hann eitt nú hendingina, tá hann á sinni lat seg avmynda í føroyska tjóðarbúnanum. Orsøkin var, at Naser Khader stutt frammanundan hevði blandað seg í spurningin um fosturtøku í Føroyum. Hann helt tað vera hóskiligt um myndin, sum skuldi takast av honum til eitt føstulávintsblað hjá Ekstra Bladet, ímyndaði okkurt, ið var aktuelt í hansara politiska yrki. Men Naser Khader segði seg ikki vita, at tað fór at skapa so stóra øsing millum føroyingar, og helt hann fyri, at tað skuldi hann ongantíð havt gjørt.

Hann tók síðani fram góðu upplivingarnar, hann og familjan høvdu havt í bæði Føroyum og Grønlandi. Eftir uppleggi og eitt lítið kjak, pakkaði Naser Khader síni ting og fór.



### Helle Thorning-Schmidt, Socialdemokraterne

Helle Thorning-Schmidt staðfesti í sínum uppleggi, at londini í ríkisfelagsskapinum skulu blanda seg í viðurskiftini hjá hvørjum øðrum – eisini hóast tað ikki altíð fellur í so góða jørð. Tað er okkara rættur, tað er tí vit eru her, og tað er galdandi fyri allar partar, segði hon millum annað. Sum dømi um hetta nevndi hon, tá hon blandaði seg í føroysk viðurskifti, tá tá spurningurin um rættindi hjá samkyndum í Føroyum var uppi at venda. Á sama hátt markeraði hon seg eisini, tá sosiala støðan í Grønlandi varð viðgjørd. Helle Thorning-Schmidt staðfesti annars, at studentadagurin á Christiansborg í dag vísti, at tað er meira enn blokkstuðulin, sum bindir londini saman. Kortini var tað ikki meiri enn 15 minuttir talutíð, sum bant forkvinnuna í Socialdemokratunum at Studentadegnum, tí eftir hennara upplegg og nakrar svaraðar spurningar, hvarv hon og var ikki at síggja aftur.